

*Eisini á vetrartíð við kavaklæddum fjøllum er landið vakurt at vitja. Útsýni av Veðranesi norður móti Hvalvík*



*Rasmus Skorheim ger gongutúrar við ferðafólki í haganum norðan fyri Selatrað*



*Kjartan Dalsgaard er formaður í Ferðvinnuni í Eysturoy*

# Vit skulu selja upplivingar

**Tað er meira umráðandi at selja ferðafólki upplivingar, sum tey minnast, enn bara eina ferð aftur og fram, siga teir, sum mynda Ferðavinnuna í Eysturoy, sum í hesum døgum hevur 10 ár á baki sum skipaður felagsskapur**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Eysturoy:** Ferðafólk skulu hava upplivingar og ikki bara ferðir, helt Simon Spies einaferð. Og so seldi hann upplivingar.

Tað sama halda tey í Ferðavinnuni í Eysturoy, sum í hesum døgum rundar tey 10 árini sum skipaður felagsskapur.

Men vit hava og lítið av upplivingum at bjóða ungum fólki. Serliga skúlaungdómi, heldur »the grand old man« í ferðavinnuhøpi í Eysturoy, Petur Martin Petersen, leiðari á kunningarstovuni í Fuglafirði.

Tað var í grundini har alt byrjaði í 1994, greiðir hann frá. Meira ella minni av tilvild fór hann sjálvboðin undir at taka í móti ferðafólki og leiðbeina teimum, sum høvdu eitthvørt at spyrja um. Árið eftir, í 1995, varð so Ferðavinnan í Eysturoy formliga stovnað. Tað var tann 20. mei, og er tað sostatt 10 ár dagurin hjá felagnum.

## Vaksandi vinna

Hetta vant upp á seg og er í dag vorðin ein rímiliga stór vinna.

Petur Martin Petersen greiðir frá, at hetta fyrsta árið skrásetti hann 127 vitjandi á kunningarstovuni í Fuglafirði. Nú er talið komið upp um tey 4.000, ið árliga vitja inn á gólvið.

Fyrsta árið rættiliga varð farið undir at skráseta ferðavinnuna í Eysturoy, vórðu skrásett 1.200 gistingar í Eysturoy, veit Kjartan Dalsgard, sum er formaður í felagnum Ferðavinnan í Eysturoy, at siga frá.

Tó leggur hann afturat, at tað er ikki heilt víst, at allar gistingar, sum veruliga vóru í oynni, vórðu skrásettar. Eitt nú skótahúsini mundu vera eitt sindur ivasom ta tíðina, og Runavíkar Sjómansheim livdi eina heldur turbolenta tilveru tey árini, so tað kann vera, at gistingarnar vóru heldur fleiri enn tær 1.200. Men ikki serliga munandi kortini, heldur Kjartan Dalsgaard.

Í dag tosa vit um einar 17.000 gistingar árliga í Eysturoy. So broyting hevur verið, so tað munar.

## Kunning

Loysunarorðið er kunning, eru tey í ferðavinnuni sannførd um. Og teir í Eysturoynni fílast eitt sindur á, at tað stendur ikki heilt so væl til við tí, sum teir kundu hugsað sær.

Eitt er, sigur Kjartan Dalsgaard, sum átti at verðið gjørt meira við. Og tað er fortelja umheiminum, at tá ein kemur til Føroya at ferðast, ber sanniliga til at gista uttan fyri Havnina.

Hann heldur, at alt ov lítið verður upplýst í kunningartilfari úr Føroyum, um gistingarmøguleikar aðrastaðni enn í Havn.

Hetta við gistingunum hevur verið ein fløskuháls-